## Ákærur ímóti Janusi Petersen sleptar

SAK Industries hevur slept øllum ákærum og krøvum ímóti stjóranum í Føroya Banka, Janusi Petersen, segði Útvarpið í gjár. Føroya Banki stendur tó við síni mótkrøv og krevur nú SAK Industries eftir endurgjaldi fyri tort og sviða og fyri sakarmálsútreiðslur. Sakførarin hjá SAK Industries møtti ikki í rættinum í gjáramorgunin, og stutt fyri fundin komu skrivlig boð um, at allar ákærur ímóti Janusi Petersen vórðu sleptar. SAK Industries ger kreativu leikurnar Mexamex, og stevndi í fjør heyst Janus Petersen fyri ærumeiðing og fyri at hava ávarað viðskiftafólk bankans ímóti amerikonsku fyritøkuni.



## Faroeship gott úrslit

Íslendski spariknívurin hevur skorið djúpt í rakstrinum hjá Faroe Ship, ið nú er farin at vinna pening. Samlaða rakstrarúrslitið hjá samtøkuni fyri farna roknskaparárið eftir skatt var eitt avlop uppá 27,5 milliónir krónur móti einum halli uppá 16 milliónir krónur árið fyri. Talan er sostatt um eina framgongd í úrsliti uppá 44 milliónir krónur.
Hetta er annað roknskaparárið hjá nýggja samtakinum, sum í dag fevnir um Skipafelagið Føroyar, Eimskipafelag Islands, samtakið hjá Hera Thomsen og Farmaleiðir. Hetta skrivar www.business-line.fo

# Samráðingar tiknar uppaftur

**Eftir at hava drukkið kaffi saman á Hotel Føroyum í morgun, tykist sum bæði Marner Jacobsen frá AFF og Kent Petersen frá Finansforbundet eru sinnaðir at finna eina loysn á lønartrætuni**

ARBEIÐSSTEÐGUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Nú røkist aftur fyri, at semja fæst á lønartrætuni, sum hevur ført til, at bankarnir hava verið læstir seinastu dagarnar.

Marner Jacobsen, formaður í AFF, og Kent Petersen, næstformaður og samráðingarleiðari fyri Finansforbundet, hava drukkið kaffi saman í morgun, og har viðgjørt støðuna, sum er íkomin.

Kent Petersen sigur, at teir báðir eru samdir um at hittast aftur til formligar samráðingar seinni í dag.

- Vit eru samdir um at hittast aftur seinnapartin saman við semingsmonnunum. Í løtuni bíða vit faktisk eftir einari telefonuppringing frá teimum, segði Kent Petersen, tá vit hittu hann stutt fyri miðdag í dag.

Kent Petersen kom beint av kaffifundinum við Marner Jacobsen til kunnandi fundin, sum Finansforbundet skipaði fyri í kjallaranum í Meinigheitshúsinum. Øll starvsfólkini í Føroya Banka og Trygd vóru við á fundinum, uttan tey úr Suðuroynni.



*Nógv fólk var møtt til kunnandi fundin hjá Finansforbundet fyrrapartin í morgun*

*Mynd: Leo Poulsen*

### Stuðul útgoldnan

Kunnandi fundurin skuldi byrjað klokkan 10.30, men klokkan var nærri 11, tá Kent kom av kaffifundinum. Hann skuldi tá kunna starvsfólkið um støðuna, og samstundis skuldu tey fáa verkfallsstuðulin útgoldnan.

- Stuðulin verður útgoldin í kekkum, og so mugu vit bara vóna, at vit finna ein peningastovn, sum er opin og kann veksla kekkarnar. Tað hevði verið nakað nógv av pengum at havt við í kontantum, helt Kent Petersen skemtandi fyri.

Seinni í dag, helst um trítíðina, fara tey øll oman á Kongabrúnna at standa uttan fyri Trygd, har sum vant verður ein pylsa at fáa hjá bæði starvsfólki og teimum, ið koma framvið.

- Men sum sagt verða samráðingar eftir ætlan tiknar uppaftur seinnapartin, og sum tað skiltist á Kent Petersen, samráðingarleiðara fyri Finansforbundet.



*Pyslur verða aftur at fáa niðri á Kongabrúnni við Trygd seinnapartin*

*Mynd: Jens K. Vang*

## Útlendsk fakfeløg stuðla bankafólki

**NFU – Nordiska Finansanställdas Union – gevur starvsfólkunum í Føroya Banka og Trygd sín fulla stuðul**

ARBEIÐSSTEÐGUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Kenneth Samuelsen, formaður í Starvsfólkafelagnum í Føroya Banka, er vælnøgdur við tann stuðul, ið onnur fakfeløg hava víst SFF. Í dag er eitt tíðindaskriv komið úr Stokkhólmi, har Norðurlendska samtakið av bankafakfeløgum veitir starvsfólkunum í Føroya Banka og Trygd sín fulla stuðul, og eisini fleiri av føroysku fakfeløgunum hava víst sín samhuga.

NFU vísir á, at tað hevur gingið væl í føroyska fíggjarheiminum, og at peningastovnarnir høvdu meiri enn 500 milliónir í avlopi í fjør.

Átta fakfeløg í Danmark, Finnlandi, Íslandi Noregi og Svøríki eru limir í samtakinum, ið umboðar 160.000 starvsfólk.